## Havn uttan Niclas Hera



Niclas Heri Jákupsson fer ikki í starvið sum stjóri fyri Klaksvíkar Havn. Ætlanin var, at Niclas Heri skuldi byrja í starvinum 1. november, men hetta verður nú av ongum, skrivar Norðlýsið. - Fortreytirnar fyri samstarvinum eru nógv broyttar,síðan eg tók av starvinum fyrr í ár, og óvissan kring Klaksvíkar Kommunu hevur gjørt, at eg havi valt at siga nei takk, sigur Niclas Heri Jákupsson við Norðlýsið. Hann fer nú aftur í leiðarastarv hjá Shell í Norðoyggjum.

## Spanskir surfarar í Suðuroy

Suðuroyarportalurin, www.sudurras.fo, veit í dag at siga, at mikudagin 19. november hava suðuroyingar møguleika at síggja surfing í heimsflokki. Tá er ætlanin, at spanskir surfarar fara at royna sínar brimfjalar í Sandvík og í Hvalba. Hesir eru eftir øllum at døma yrkissurfarar og hava teir egið filmslið við á ferðini. Í Suðuroy vóna tey, at teir fáa nakrar góðar aldur at ríða á og teir eisini fáa nakrar góðar myndir úr Suðuroynni.

*kelda: www.sudurras.fo*

# Bókin um Wester



*Skerini vestan fyri á Suðuroynni, har hollendska skipið Westerbech fór á land fyri 266 árum síðani*




**Í ár høvdu føroyingar høvi at fylgja við á netinum og í bløðum, tá kavarar leitaðu vestanfyri Suðuroynna, har hildið var, at hollendska skipið Westerbeek fór á land 2. spetember í 1742. Orsøkin til at kavarar fóru niður var, at Mathias Lassen skrivaði bók um hendingina, og bókin, sum lýsir hendingina út í æsir, er nú veruleiki, og verður løgd fram í Stóra Pakkhúsi í Vági hósdagin**

WESTERBEEK

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Enn er neyvan nakar, ið hevur lisið bókina um Westerbeek, uttan høvundurin sjálvur, og rættlesararnir. Bókin er nevniliga spildur nýggj, og verður løgd fram í Stóra Pakkhúsi í Vági hósdagin klokkan 17:00.

Tað gerst beinanvegin greitt, tá ein fær bókina í hondina, at her er talan um dygd, og eitt stórverk. Og eftir at hava blaðað í henni eitt sindur, er allur ivi burtur. Her verður onki latið eftir ósvarað, sum greiða á nakran hátt kann fáast á.

Mathias Lassen hevur við hesi bók lýst hendigina út í æsir, og øll søgan um Westerbeek, sum fór á land vestanfyri Suðuroynna í mjørka tann 2. september í 1742, og øll søgan aftan á, so sum hvat hendi við manningini, og at teir hava eftirkomarar í Føroyum, er eisini kannað.